# Niels Nattestad skrivari hjá Sambandsflokkinum



Sambandsflokkurin hevur sett Niels Nattestad úr Havn í starv sum floksskrivari. Talan er um eitt avloysarastarv, nú floksskrivarin seinastu níggju árini, Helgi Abrahamsen, er vorðin tingmaður. Niels Nattestad er útbúgvin lærari, og hann hevur áður millum annað verið skúlastjóri á Venjingarskúlanum. Floksskrivarin tekur sær av dagligu floksumsitingini, og harumframt er hann eisini skrivari hjá tingbólkinum. Starvið sum floksskrivari hjá Sambandsflokkinum er fulltíðarstarv, og nýggi skrivarin byrjar í starvinum tann 15. november.

# Tveir listar í Hvalba

Til kommunuvalið í morgin er tveir listar komnir inn við íalt 17 valevnum. Á lista A eru tey 11 í tali og á lista B eru tey seks. Sama lutfallið er eisini millum talið av kvinnum og monnum, tí 11 mans eru á báðum listunum og 6 kvinnur. Nevnast kann, at tvey av hesum 17 valevnunum eru úr Sandvík. Hini eru øll úr Hvalba. Borgarstjórin, Otto West úr Hvalba stillar eisini uppaftur.




*Landsstýrið hevur ein framúr møguleika at vísa, at politiski myndugleikin meinar nakað við at menna útjaðaran við at gera Norðhavnina í Ánunum til fast atløgupláss hjá Norrønu*

*Savnsmynd*

# Norðoyingar vilja hava Norrønu

**Norðoya Sjálvstýrisfelag heitir á tingið um at gera íløguna í Smyril Line til eitt íkast til útjaðaran. Eisini kann hetta skapa størri reglusemi í rutusiglingina hjá Norrønu**

FERÐAFLUTNINGUR

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Nú Føroya Løgting hevur samtykt at bjarga Smyril Line undan húsagangi, heitir Norðoya Sjálvstýrisfelag á tingið um at gera Norðhavnina í Ánunum til heimstað og fast atløgupláss hjá Norrønu.

- Við hesum hevði íløgan hjá landskassanum gjørt størst gagn bæði hjá landinum og Smyril Line. Høvuðskommunan í Norðuroyggjum, Klaksvík, er eitt øki í landinum, sum í løtuni hevur stóran tørv á at verða styrkt, skrivar Sjálvstýrið í Norðoyggum.

Felagið vísir á, at vinnulívið í Klaksvík hevur tørv á beinleiðis atgongd til av- og áskiping, og tað er einki meira enn rímiligt, at Norðuroyggjar fáa sín part av ágóðanum av gjøldum í sambandi við farma- og ferðaflutning, nú tað almenna setir pening í hesa vinnu.

Norðoya Sjálvstýrisfelag vísir til tøl frá Hagstovu Føroya, ið gera greitt, at kommunurnar í Norðoyggjum eru tær kommunur í Føroyum, ið eru mest tengdar at tilfeingisvinnuni. Harafturat er Klaksvíkar kommuna komin í fíggjarligt ófør, samstundis sum at útlitini fyri tilfeingisvinnuna eru døpur.

- Norðhavnin er ein veðurgóð havn, sum kann tryggja skipi og ferðafólki reglusemi. Við at gera hesa havn til fast atløgupláss hjá Norrønu, gerast møguleikarnir betri at røkka endamálinum í samgonguskjalinum, skrivar Norðoya Sjálvstýrisfelag í tíðindaskrivi.

Felagið vísir á, at í samgonguskjalinum stendur, at við verandi búskaparstøðu er neyðugt, at tað almenna ger íløgur, ið kunnu vera við til at seta gongd á virksemið kring landið. Eisini stendur, at haldast skal fram við arbeiðinum at marknaðarføra Føroyar í útflutnings- og ferðavinnuhøpi, soleiðis at vit fáa greiðan kappingarsamleika. Harafturat skal ein yvirskipað ætlan fyri menning og marknaðarføring av Føroyum og ferðavinnuni verða gjørd, so hon kann gerast vinnuligt íkast fyri alt landið.

Norðoya Sjálvstýrisfelag heldur, at Føroya Landsstýri sum høvuðspartaeigari í Smyril Line nú hevur ein góðan møguleika at vísa, at samgongan meinar nakað við tað, sum stendur í samgonguskjalinum.

# Gistingarhús og matstovur fyri at bjarga Smyril Line

**Hóast tey flestu av teimum, sum vórðu kallað inn til fíggjarnevnina og vinnunevndina í gjár vendu tumlunum niðureftir mótvegis bjargingarætlanini fyri Smyril Line, so hevði Gistingarhús- og Matstovufelagið aðra hugsan**

SMYRIL LINE

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Felagið vil undirstrika, at tað er av alstórum týdningi fyri vinnuna at hava eina slíka farleið, sum er bygd upp gjøgnum síðstu nógvu árini, sigur Gistingarhús- og matstovufelagið, sum heitir á løgtingi um ikki at lata farleiðina detta niðurfyri, so vit koma at standa uttan sjóvegis samband við útheimin.

Felagið heldur, at tað er sera umráðandi, at vit ikki minka um ferðafólkatalið, og at vit skulu minnast til, at ferðavinnan er ein vinna, har útlendingurin leggur pening eftir til landið.

- Smyril Line hevur nú avgjørt at broyta ferðaætlanina soleiðis, at Noreg og Skotland verða tikin úr ferðaætlanini. Vit harmast um, at man tekur ferðamál burtur úr ferðaætlanini, sum hava verið undir uppbygging í fleiri ár, við til at fáa ferðafólk hendavegin, og vónandi verða ruturnar tiknar uppaftur seinni, sigur felagið.

Felagið sigur eisini, at um løgtingið setur pengar í Smyril Line, so fegnast tey um, at ferðaætlanin verður broytt soleiðis, at siglt verður til Danmark tvær ferðir um vikuna, og gevur hettar sostatt ein betur regularitet til meginlandið.

- Vit vita eisini, at nógv tann størsti parturin av ferðafólkunum koma úr ella via Danmark. Tað, sum hóast alt er mest avgerandi fyri okkum er, at fleiri ferðafólk koma til landið, tí vit hava stóran hotelkapacitet tøkan eisini um summarið, sigur Gistingarhús- og Matstovufelagið í sínum viðmerkingum til Vinnunevnd Løgtingsins.

Skrivað undir viðmerkingar hevur Ása Johnsdóttir, forkvinna Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya. Ása Johnsdóttir er stjóri á Hotel Hafnia í Havn.

# Landið hevur altíð verið uppi í Smyril Line

**- Landsstýrið hevur verið partaeigari í Smyril Line frá fyrsta degi av, og tað er rætt av tí almenna at seta pengar í aftur nú, sigur Óli Hammer, fyrrverandi stjóri**

SMYRIL LINE

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

- Tá siglingin byrjaði í 1975, var hon almenn, og landsstýrið var við 20 prosentum partaeigari frá fyrsta degi í Smyril Line, tá tað var stovnað í 1983. At landsstýrið nú kemur inn við 25 prosentum, er gott, tí frá byrjan vildu vit hava teir inn við 40 prosentum, segði Óli Hammer, stovnari og fyrrverandi stjóri í Smyril Line, við útvarpið hjá Kringvarpinum leygardagin.

Hóast hetta ikki er fyrstu ferð, at Smyril Line kemur til tað almenna eftir pengum, heldur Óli Hammer, at landsstýrið ger tað rætta:

- Í 1984 fingu vit eitt veðhald upp á 10 milliónir krónur, men tað innfríaðu vit í 1989, so landið fekk alt sítt aftur, sigur Óli Hammer, sum heldur tað vera bíligt, at fólk nú siga, at nýggja Norrøna er ov stór.

- Tað er lætt at siga aftaná, men vit dugdu at síggja, at skuldu vit hava inntøku alt árið, máttu vit satsa upp á farmaflutning, og tí bygdu vit eitt lastarskip við einum hotelli omaná, segði Óli Hammer við Kringvarpið.

Hann heldur tað vera rætt av leiðsluni í Smyril Line at sleppa teimum rutum, sum geva hall.